Astri Luhin, Kári Svensson, Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, Amariel Nor›oy og Ey›un av Reyni (Mynd: Jens Kristian Vang)

Listin vísir hvør tú ert

SYMBOL Inntil 1995 mála›i eg mest naturalistiskt, men so hendi naka›, sum ávirka›i meg sera nógv, sigur Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen av Ei›i. – Dey›in kom inn í okkara familju, og aftaná ta› var alt broytt. Tá var ta› fyrstu fer›, at symbol komu inn í mínar myndir, og sí›ani tá havi eg ikki kunna slept teimum

Birgir Kruse

Sigrun, um gó›ar tvær vikur letur tú sjálv fimta upp frams‡ning í New York. Hvussu kom henda amerikanska frams‡ningin av føroyskari list í lag?

Í november í 1997 vóru vit sum familja í New York í sambandi vi›, at Tordur, ma›ur mín, var› eyglei›ari fyri Føroyar á ST a›alfundinum har. Tá møtti eg Elfi von Kantzow í donsku Sjómanskirkjuni. Elfi er svensk, gift danskara, og tey munnu hava bú› í New York í eini 50 ár. Hon hevur skipa› fyri nógvum listaframs‡ningum, sum kuratorur fyri American Scandinavian Society og er ein sera áhugaverd kvinna.

Tá i› hon fekk at vita, at eg var listakvinna, vóru vit beinanvegin á bylgjulongd, og práti› fall sjálvsagt á Føroyar og føroyska list, og hvussu ta› hev›i veri› at skipa› fyri einari føroyskari frams‡ning í sjálvum hjartanum í New York.

Hetta var› so byrjani til frams‡ningina, sum hin 5. desember letur upp í New York. Sí›ani tá havi eg so havt regluligt samband vi› Elfi. Hon og ma›urin vóru og vitja›u okkum í summar.

Í sambandi vi› ætla›u frams‡ningina samla›i eg sí›ani tilfar frá 14 listafólkum, sum var› sent til metingar hjá Elfi. Úrsliti› gjørdist so, at vit fimm, Astri Luihn, Kári Svensson, Amariel Nor›oy, Ey›un av Reyni og eg sjálv vór›u tey, i› komu at mynda hesa fyrstu frams‡ning í New York. Vónandi ver›ur hetta bert ein byrjan til ví›ari samstarv á listarliga økinum.

Hvørjar eru umstø›urnar, har s‡nast skal fram?

Nú havi eg ikki veri› og sæ› T.A.G. Gallery sjálv, men sambært Elfi eru hølini ljós, gó› og høgt er til lofti›. Hølini liggja sera væl fyri, mitt í New York, beint vi› Fifth Avenue, tætt vi› tey kendu listasøvnini sum Guggenheim, Metropolitan og Witney. Eisini eru ein hópur av matstovum har um vegir.

Hvussu ver›ur farlei›in hjá tykkum, sum fara úr Føroyum ,og hvussu skulu tit búgva í hesum stóra sta›i, beint uppundir jól?

Fer›in hjá okkum byrjar fríggjadagin 1.desember, tá vit flúgva til Reykjavíkar; ver›a eina nátt á Sjómansheiminum Ørkini og ha›ani ver›ur so fari› til Keflavíkar vi› bussi. Sí›ani ver›ur flogi› til New York, har vit ver›a leygarkvøldi› um 6 tí›ina. Me›an vit eru í Reykjavík, fara vit eisini at vitja á Hafnaborg, har vit fimm skulu hava eina frams‡ning í aprílmána›i næsta ár.

Í New York gista vit á YMCA. Ta› liggur eisini sera væl fyri. Beint vi› Central Park og tætt vi› T.A.G. Gallery, har vit s‡na fram.

Grei› mær frá um tey myndaevni, tú arbei›ir vi›. Tey eru eitt sindur - ein heilan deil - annarlei›is enn hjá ø›rum listafólki í Føroyum. Hví? Er nøkur ætlan, ella serligur vilji í hesum serstaka motiv-vali? Ein serligur heimur, tú vilt lata upp fyri?

Mínar myndir eru míni hjartabørn. Eg havi altí› vilja haft naka› at givi› vi› mínum málningum, frá tí eg minnist. Eisini tá i› eg gekk á Akademinum, men tá var eg sera bundin í mínum myndavali. Ta› er altí› ein partur av mær, sum liggur í hvørjari mynd, tí havi eg sera torført vi› at sleppa teimum. Ta› ver›ur so intenst.

Inntil í 1995 mála›i eg mest naturalistiskt, men so hendi naka›, sum ávirka›i meg sera nógv. Dey›in kom inn í okkara familju, og aftaná ta› var alt broytt. Tá var ta› fyrstu fer›, at symbol komu inn í mínar myndir, og sí›ani tá havi eg ikki kunna slept teimum. Eg veit satt at siga ikki, hví míni myndaevni eru annarlei›is enn hjá nógvum føroyskum listafólkum - eg havi einki svar.

Nú eri eg ein kristin, eg veit ikki um ta› kann hava naka› vi› myndavali› at gera - kanska, men ta›, sum ein er sannførdur um kemur jú til sjóndar, í tí ein ger, antin so ella so, so kanska er ta› ta›? Eg haldi ikki, at eg bevíst vil lata naka› upp, men eg vil vi› mínari list koma vi› nøkrum alternativum, l‡sa, at Gud ikki er dey›ur, og at lívi› er vert at liva, hóast alt.

Kanska er ta› ein av grundunum? Men at symbolini eru komin inn er ikki bevíst. Eg havi sett mær fyri, at einki ella eingin skal ste›ga mær. Eg má mála alt ta›, sum liggur mær á hjarta.

Mær dámar sera væl Dr. H. R. Rookmaker, professara í listasøgu, og hansara sjónarmi›. Hann sigur í bók sínari.”Art needs no justification” m. a., at ”ein kann ikki velja ein stíl sum best ber til, tí stílurin er ein partur av innihaldinum, ta› listarverki› sigur, liggur í sjálvum forminum. Á ein hátt hevur listamálarin ikki ein stíl, sum kann skiftast út vi› ein annan; hann er ein stílur. Í stílinum vísur hann, hvør i› hann er”.

Arbei›slagi›, hvussu er ta›, tá tú málar? Nakrar serligar arbei›svanar?

Eg eri A-menniskja, so mær dámar best á morgni. Vanliga fari eg ein túr oman á Møl vi› hundinum. So fari eg til verka. Tá er eisini fri›ur í húsinum. Børnini eru farin í skúla og ma›urin til arbei›is. Tá kann eg arbei›a frá umlei› klokkan 9 til umlei› klokkan 15. Oftani havi eg fleiri myndir fyri ísenn, ta› dámar mær best, og jú meira eg arbei›i, tess meira veri› eg inspirera›. Eg fari at nevna or›ataki› ”Eitt gott listaverk er 95% arbei›i og 5% inspiratión.” Ta› er sannuliga naka› at hugsa um.

Setir tú tær sjálvari nøkur ávís krøv tá tú málar?

– Sum tann einasta í familjuni, i› fór tann listarliga vegin, gjørdi omma av, at eg skuldi arva málarakassan og staffeli›i›. Ta› eri eg framvegis sera gla› og stolt av og ta› ver›ur nógv brúkt.
Abbi Sigrun, Niels Kruse (1871-1953), sæst á myndini undur bowlarhatti, til vinstru fyri duraopninginum. Myndina hevur skotski myndama›urin Mr. Norrie tiki› í túninum hjá Kruse og teimum í 1894

Sum krav vil eg, at myndirnar skulu ver›a í balansu, bæ›i í liti og skapi. Um ikki, so er ta› eitt bevíst val. Naka› eg hugsi sera nógv um nú, er ta›, at mi›jan skal ver›a fylt upp, sum ta› t‡dningarmesta í myndini.Ta› sentrala — sjálv lívsnervin, sum alt gongur út frá.

Eg hugsi altí› nógv í samband vi› hvørja einastu mynd. Og so dámar mær sera væl at lurta eftir tónleiki me›an eg máli.

Hvussu vi› ateliéri, hevur tú atgongd til ta›?

Eg havi eitt atlier, sum er umlei› 20 fermetrar til støddar og vi› gó›um ljósi.

Tú bú›i eina tí› í Grønlandi; eg havi varnast, at vali› av myndaevnum endurspeglast í hesum; broytti Grønland teg sum menniskja og listafólk — og kann ein forrestin skilja ímillum menniskja og listafólk?

Í 1998-1999 vóru vit sum familja í Eysturgrønlandi. At vera so langt burturi og so avbyrgdur í eitt heilt ár má seta síni spor. Eg upplivdi alt sera intenst. Ta› var tungt til tí›ir, men sera læruríkt. Á fleiri økjum var ta› sum at fara 40 ár aftur í tí›ina. Men tú livdi, me›an tú livdi. Fólkini vóru sera fitt, vit blivu gó› vi› tey og umvent.

Undarligt er lívi›; vit fingu ein sera gó›an vin, sum lærdi dreingirnar hjá okkum alt um fangaralívi›. Men sjálvan Páskadag fór hann út á ísin vi› familjuni og doy›i har úti, bert 40 ára gamal. Ta› tók sera fast hjá okkum øllum. Náttúran og hundarnir - alt gav mær naka›, sum ikki kann forklárast.

Og ikki at forgloyma ljósi›, sum ávirka›i meg sera nógv. Eisini henda stórsligna tøgnin, sum tú merkti, tá tú vart úti á ísinum á hundasle›u. Ikki eitt lot ella ljó›, uttan bara su›i› fra skinnarunum á hundasle›uni. Ta› var eitt veldugt upplivilsi. Tú vart eitt vi› náttúruna! Ta› var, sum komst tú tí æviga nærri, kenslan av Guds nærveru. Ta› sæst aftur í málningum mínum, alt anna› er heilt ógjørligt.

So listarliga mentist eg jú uttan iva, eisini tí, at listin og menniskjan kann jú ikki skiljast sundur. Listin vísur, hvør tú ert sum menniskja og umvent.

Listamálarin Niels Kruse var abbi tín. Hvussu minnist tú hann?

Abba mín minnist eg ikki, eg var bert 3 ára gomul, tá i› hann doy›i. Ta› sum eg veit, havi eg fingi› fortalt. Hann var ein sera dámligur ma›ur, kenslubor›in og gó›ur vi› børn. Mála›i hvønn einasta dag og hev›i leingi um hvørja mynd. Tá mamma og mostur hildu, at nú var málningurin li›ugur, fór abbi rættuliga í gongd.

Í me›an børnini vóru smá høvdu omma og abbi postin. Eisini plagdi abbi at skera út og mála navnamerki til bátar, og var doktarin burtur, so heittu tey á abba. Tá var hann áliti›, so hann hev›i nógvar ymiskar uppgávur her nor›uri. Málningarnir vóru ikki d‡rir tá — 25 krónur fyri hvønn. So ta› var mangan smáligt hjá teimum, men tey høvdu ta› gott. Hev›i hann ikki havt so gó›a konu, so hev›i ta› nokk ikki gingi›. Abba dámdi sera væl, tá i› onkur kom inn á gólvi›, sum hev›i skil fyri list.

Tá bleiv hann so upplyftur og gla›ur; Ásmundur Poulsen spurdi abba einafer›, um hann ikki kundi læra seg at mála. Tá svara›i abbi, at ta› kundi hann ikki. Ta› mátti ein ver›a føddur vi›. Mamma sigur frá Ingálvi av Reyni, at abbi var sera livandi og hjartaligur, tá hann vísti sínar myndir fram.

Hvat heldur tú um málningar hansara; nakra favoritt-mynd?

Málningar hansara dámar mær sera væl . Teir eru á sera høgum listarligum stø›i, haldi eg. Einki merkt av tilvild, alt væl gjøgnumhugsa›. Hann var sera vælger›in. Sjálv eigi eg ein lítlan málning frá 1921, sum eg eri ómetaliga gla› fyri. Ein sonn perla frá abbasa hond.

Sum tann einasta í familjuni, i› fór tann listarliga vegin, gjørdi omma av, at eg skuldi arva málarakassan og staffeli›i›. Ta› eri eg framvegis sera gla› og stolt av, og ta› ver›ur nógv brúkt.

Takk fyri práti›, gó›a eydnu og ikki minst gó›a fer› til New York!

Takk fyri ta›.

- Vónandi ver›ur frams‡ningin hjá okkum fimm í New York bert ein byrjan til ví›ari samstarv á listarliga økinum. Astri Luhin pakkar

Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen (f. 1950) á Ei›i var næmingur á tekniskúlanum hjá Askou-Jensen á Glyptotekinum í Keypmannahavn 1971-72, sí›an á málaraskúlanum og grafikkskúlanum á listaakademinum hjá Wilhelm Freddie, Dan Sterup-Hansen, Freddie A. Lerche og Sven Dalsgaard 1973-80. Í mong ár sóust av og á landslagsmálningar frá hennara hond, og l‡singar av útró›rarmonnum umbor› á bátum sínum. Men tey seinastu fimm árini hevur hon fingi› høvi til at hugsavna seg um myndlistina, og hon hevur funni› seg sjálva í einum ímyndandi stíli, har hennara trúarliga sinni fær andarúm. Í symbol-løddum l‡singum, i› hava surrealistiskan dám, ver›ur stø›utakan til tilverunar stóru spurningar — fø›ing, dey›a og uppreisn í páradísi — av fullum huga bo›a›.
(úr ”Myndlist í Føroyum” Bár›ur Jákupsson, Sprotin 2000)

»From The Atlantic Edge« frams‡ningin vi› teim fimm føroysku listafólkunum ver›ur í T.A.G. Gallery, 24 West 57th Street, 3rd floor, New York City. Lati› ver›ur upp t‡sdagin 5. desember 17:30, tá danski sendiharrin Michael Mørch tekur ímóti, Ey›un Andreasen sigur frá um Føroyar og Edvard Nyholm Debes og Stamen Stantchev spæla n‡ggjan føroyskan tónleik. Frams‡ningin er opin t‡sdagleygardag 10-17 fram til hin 23. desember.